UTTAN ÚR HEIMI

## Quisling var ikki landasvíkjari

-Maður mín var ikki landasvíkjari, men ein pínslarváttur, sigur Maria Quisling í einari samrøðu, sum norska blaðið Telemarksavisa endurgav í gjár. Samrøðuna gjørdi amerikanski blaðmaðurin Ron Laytner, og hetta er vist einasta samrøðan, sum nakar fjølmiðil hevði við Mariu Quisling.

Maður hennara, Vidkun Quisling, varð ákærdur fyri landasvik aftan á seinna heimsbardaga fyri at hava samstarvað við týska hersetingarvaldið í Noregi, og tann 24. oktober í 1945 varð hann avrættaður á skansanum í Akershus.

Men hann hevði ikki uppiborið slíka viðferð, sigur Maria Quisling í samrøðuni. Hon sigur, at maður hennara var góður við Noreg og tað norska fólkið, og at hann var sannførdur um, at hann gjørdi tað, sum var best fyri Noreg og norðmenn. Í samrøðuni sigur Maria Quisling eisini, at hon heldur ikki, at Vidkun var so illa umtóktur í Noregi undir heimsbardaganum. Men hetta broyttist, tá bardagin endaði.

## Deyðadómur broyttur

Fyri einum ári síðani varð iranska kvinnan Leyla Mafi dømd til deyða fyri skøkjuvirksemi og fyri at hava átt eitt barn uttan fyri hjúnarlag, men eftir áhaldandi mótmæli úr útheiminum er dómurin nú broyttur. Sambært Aftenposten skal kvinnan hava 99 koyrlasløg umframt hálvt fjórða ára fongsul.

Leyla Mafi bleiv noydd at liva sum skøkja, longu tá hon var átta ára gomul. Tað var familjan, sum noyddi hana til tess. Sum blaðung fekk hon barn og varð dømd fyri skøkjulevnað. Tá hon var tólv ára gomul, fekk ein afghanskur maður hana til konu, og hann noyddi hana at halda fram sum skøkja. Seinni varð hon seld einum 55 ára gomlum manni, sum eisini noyddi hana at halda fram við skøkjulevnaðinum. Tað endaði við, at hon fekk tvey børn afturat. Tá Leyla Mafi var 18 ára gomul, bleiv hon dømd fyri skøkjuvirksemi og fyri at hava átt børn uttan fyri hjúinarlag. Hon varð dømd til deyða, men hesin dómurin er nú broyttur.

Sambært Aftenposten hava fleiri kanningar víst, at Leyla Mafi er menningartarnað, og at sálarliga er hon sum eitt átta ára gamalt barn.

## Bókhandlarin svarar aftur

Afghanski bókhandlarin Muhammad Rais gjørdist kendur um allan heimin, tá norska tíðindakvinnan Åsne Sejeerstad skrivaði ta kendu bókina "Bókhandlarin í Kabul", sum er um Muhammad Rais og hansara næstu.

Muhammad Rais var alt annað enn fegin um innihaldið í bókini, og hann og onnur gjørdu fleiri royndir at forða fyri, at hon varð givin út uttan fyri Noreg. Eftir teirra tykki segði bókin ikki allan sannleikan, og í summum førum fór hon ov nær teimum persónligu viðurskiftunum.

Nú hevur Muhammad Rais gjørt av at skriva sína egnu bók, og ein partur av henni fer at snúgva seg um Åsne Sejerstad og bók hennara. Bókhandlarin í Kabul kemur til Noregs 5. november, og har fer hann at kanna, hvat norskir fjølmiðlar hava sagt um ta kendu bókina. Hann hevur ikki gjørt av, um hann fer at tosa við Åsne Sejerstad, men hon sigur seg vera til reiðar at hitta hann.

## Drakk reyðvín

Granskarar hava nú avdúkað, at tann gamli egyptiski kongurin Tutankhamon dámdi væl reyðvín.

Spanskir granskarar hava í seinastuni kannað vínkjallaran hjá Tutankhamon, sum var kongur í Egyptalandi fyri meiri enn 3300 árum síðani. Hann doyði í árinum 1352 fyri Kristi føðing. Granskarar hava leingi vitað, at Tutankhamon man hava drukkið vín, tí í grøv hansara lógu fleiri vínkannur. Hinvegin hava granskararnir ikki vitað, um hann drakk hvítvín ella reyðvín, men nú siga teir sponsku granskararnir, at tað var reyðvín.

Tær gomlu vínkannurnar prógva enn einaferð, at egyptararnir stóðu ikki so langt aftan fyri okkum á fleiri økjum. Á kannunum hjá Tutankhamon standa ymsar upplýsingar um vínið í teimum - júst sum uttan á vínfløskunum á okkara døgum, skrivar AP.

# Høvdu kanska ætlanir um yvirgang í Danmark

**Teir fýra ungu menninir, sum eru tiknir í Danmark, høvdu samband við fólk á Balkan, sum eru undir illgruna fyri yvirgang**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fýra ungir menn úr Keypmannahavn sita nú varðhaldsfongslaðir, meðan løgreglan kannar, um teir høvdu lagt ætlanir um yvirgang í Danmark ella aðrastaðni í Evropa.

Løgreglan í Glostrup segði í gjár, at hon hevur fingið ábendingar um, at menninir, sum eru ímillum 16 og 20 ára gamlir, høvdu lagt ætlanir um yvirgang í Evropa. Teir fýra hava sín uppruna í Miðeystri, og bara ein teirra er dansur ríkisborgari.

Danska løgreglan gjørdi av at kanna viðurskiftini hjá teimum fýra nærri, eftir at tveir víðgongdir menn vórðu tiknir á Balkan í næstsíðstu viku. Í sambandi við tær báðar handtøkurnar funnu myndugleikarnir eina stóra nøgd av spreingievni. Einki spreingievni varð funnið heima hjá teimum fýra, sum eru tiknir í Keypmannahavn, men løgreglan legði hald á teldur, fleiri fartelefonir og umleið 200.000 krónur í donskum og útlendskum gjaldoyra.

- Vit halda okkum hava prógv fyri, at teir fýra handtiknu hava havt samband við teir báðar menninar, sum vórðu tiknir á Balkan, segði Sten Skovgaard Larsen, kriminalkommisserur hjá løgregluni í Glostrup, í gjár. Hann vildi tó ikki siga, í hvørjum landi á Balkan hinir báðir menninir vórðu tiknir.

Fleiri altjóða tíðindastovur vildu í gjár vera við, at myndugleikarnir í Bosnia hava tikið tríggjar menn, og at teir hava ríkisborgararætt í Turkalandi, Bosnia og Svøríki. Heima hjá monnunum fann løgreglan spreingievni og fleiri vápn. Sambært Reuter er illgruni umn, at teir tríggir høvdu lagt ætlanir um eina sjálvmorðsatsókn at einari sendistovu í Sarajevo, og at ein av teimum tiknu skuldi fremja atsóknina.




*-Vit halda okkum hava prógv fyri, at menninir høvdu lagt ætlanir um yvirgang í Evropa, kanska í Danmark, sigur Sten Skovgaard Larsen*

*Savnsmynd*

# Aftur illveður í Karibia

**Tann 23. tropiski stormurin í ár hevur fingið navnið "Beta", og hann kann enda sum ein ódn.**

VEÐUR
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Fólk við Karibiska Havið og Meksikanska Flógvan hava nóg illa summað seg aftan á ódnina "Wilmu", so hava veðurmenninir aftur boðað frá illveðri. Hesaferð snýr tað seg um ein tropiskan storm, sum hevur fingið navnið "Beta".

Veðurmenninir rokna við, at "Beta" fer at menna seg til eina ódn, og at hon fer at bera við land í Nikaragua í dag. Í gjár var miðdepilin ella eygað í "Beta" góðar 100 fjórðingar úr landi.

"Beta" er tann 23. tropiski stormurin í ár, og so nógvir hava stormarnir ikki verið fyrr í einum ári.

# Ræna skipsvrak

Kavarar eru farnir at gera seg inn á gomul skipsvrak, sum liggja á botni ymsastaðni fram við norsku strondini. Eitt nú hava kavarar tikið ymsar lutir úr 77 av teimum 86 vrakunum, sum liggja á botni á Stavanger-leiðini. Tað elsta vrakið er frá 1537, og tí eru lutirnir søguligir, skrivar Aftenposten.

Tað er ikki heilt greitt, hvat kavararnir gera við teir rændu lutirnar. Tað mesta endar helst í Noregi, men sumt verður flutt av landinum og selt. Tað gongur tó ikki altíð. Eitt nú varð ein maður tikin í tollinum í Kristiansand í vár, tí tað vísti seg, at hann hevði fleiri gamlar vraklutir í viðførinum.

Norsku fornminnismyndugleikarnir royna at dylja, hvar tey gomlu vrakini liggja, men tað vísir seg ikki at vera so lætt at dylja slíkt.